# Summarkapping 2008

LÝSINGARTILFAR

## Sosialurin á ferð

### BILLUND - barnabýur burturav

Í góðveðrinum á hvítusunnu var Sosialurin fimm dagar í Billund, har vit við barnabrillum og foreldraeygum upplivdu heimskenda legobýin. Fyrstu dagarnar gistu vit á Hotel Legoland og seinni á Hotel Propellen, sum er beint við. Heimanífrá leigaðu vit bil frá 62° N, sum stóð klárur á flogvøllinum í Billund. Ein dag koyrdu vit 20 minuttir norðureftir til Givskud Zoo, og ein annan dag tveir tímar suðureftir til Danfoss Universe á oynni Als. Men alt hetta kunnu tit lesa meira um hesa vikuna í Summarkappingini, har leiðin gongur til Billund.

Heimasíða:
www.givskudzoo.dk

# Givskud Zoo og Løvepark



Aftan á tveir minnisríkar dagar í Legoland gekk leiðin við bili norðureftir til "Løveparken Givskud Zoo". Veðrið var av tí fagrasta allan dagin, so tíbetur hevði leigubilurin air-condition.

Givskud Zoo er ein modernaður safari djóragarður við hópin av villum djórum, sum ganga leys á stórum fløtum. Tey vitjandi koyra runt í egnum bili ella í einum Safari-bussi. Parkin er býtt sundur í trý stór øki: Suðuramerika, Norðuramerika og Asia. Í hvørjum heimsparti ber til at steðga og spáka sær ein túr millum øll djórini. Eisini eru steðgipláss við smáum sølubúðum, kioskum og matstovum.

**Livandi leyvulív**

Sum navnið sigur, er parkin serliga kend fyri mongu leyvurnar. Hóast tær eru sera vandamiklar, ber til í bili at koyra tætt uppat teimum. Sjálvandi eru trygdarreglurnar sera strangar á hesum avmarkaða økinum. Bilarnir verða sleptir innum ein og ein, og umráðandi er at lata vindeygu og hurðar heilt aftur.



*Longu heimanífrá bíløgdu og rindaðu vit á Internetinum fyri eina lekra picnic-kurv. Tá svongdin kom á okkum einaferð út á seinnapartin, fóru vit eftir matinum í matstovuni. Síðani funnu vit okkum ein vakran blett í sólini tætt við grillurnar, sum stóðu tendraðar. Í picnic-kurvini vóru moyrir búffar, marineraðar høsnarungabringur, pylsur, salat, flutes, drykkivørur, skaffigreiður og okkurt lekkurt omaná. Mett og væl sett samdust vit um, at hetta var ein hin besta løtan á øllum Danmarkar-túrinum*

## Danhostel Givskud Zoo Vandrerhjem

**Beint yvirav villu djórunum í Givskud Zoo liggur eitt hugnaligt vallaraheim. Har eru 26 kømur við vesi og bað, umframt tvey stór felagskømur.**

**Morgunmatur og náttúrði fáast til keyps í matarhøllini, har stórt sjálvtøkuborð er bæði morgun og kvøld. Eisini er stórur gestakøkur til teirra, sum heldur vilja matgera sjálvi.**

**Kostnaðurin fyri at gista á vallaraheiminum er sera lagaligur, til dømis kostar tað bert 600 kr. fyri fýra fólk eina nátt í familjukamari í háárstíð. Leigan av seingjarklæðum og morgunmatur fáast fyri lítið og lætt.**

**Kostnaður:**
**Børn undir 3 ár ókeypis**
**Børn 3-11 ár 80 kr.**
**Vaksin 140 kr.**

### Puntur nr. 22






## Lyklaklár fígging og trygging til bilin

Ætlar tú at keypa bil, bjóða vit tær fígging og trygging um eina leið. Tú fert beint inn á bilasøluna, har tú fært landsins bíligastu og skjótastu fígging beinanvegin. Í somu vending avgreiða vit tryggingina. Tú fært lykilin og koyrir avstað.

Kongabrúgvin, Postboks 329, FO-110 Tórshavn,
Tel 345600, Faks 345601, tf@trygging.fo, www.trygging.fo

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
- so ert tú tryggari

sansir.fo